

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 03 - 2013

# Hoyvíkingur KT-mennir oljuvinnu í Norra

Føroyingar arbeiða víða um í altjóða oljuvinnuni, eisini við KT uppgávum. Ein teirra er hoyvíkingurin Christian V. Dalsgaard, sum júst hevur staðið fyri eini programmeringsuppgávu fyri stóru norsku oljufyritøkuna, Aker Solutions. Christian V. Dalsgaard, ið er Microsoft SharePoint serfrøðingur, búsitandi í Hoyvík, hevur júst endað ein programmeringsuppgávu í oljuvinnuni í Noregi. Krumtappurin í arbeiðinum hjá Christian V. Dalsgaard hevur í mong ár verið Vága Floghavn, tí at kundarnir aloftast eru í Danmark ella Noregi verður sagt í tíðindaskrivi. Christian V. Dalsgaard er ráðgevin, sum tær stóru donsku fyritøkurnar ofta fáa inn gjøgnum bakdyrnar, tá teirra KT-verkætlanir miseydnast. Hesa ferð komu boð frá oljuvinnuni í Noregi. Tey vildu hava ein ráðgeva við hollum royndum í knowhow í tí nýggjastu SharePoint skipanini frá Microsoft. Microsoft SharePoint er ein webbaseraður vitanardeilings- og dokumentstýringsportalur, sum verður nýttur til bæði intranet og heimasíður. Kundaskarðin, ið Christian V. Dalsgaard sum beinleiðis veitari ella sum undirveitari hevur hjálpt, eru m.a. Falck, Novozymes, Statoil, Danmarks Nationalbank, CSC (tey, sum høvdu Tour de France), Dansk Supermarket, FDB, samanlagt 6 bankar, Lederne, kommunur og staturin. Kundin í Noregi var Aker Solutions, sum hevur 28.000 starvsfólk í 30 londum í olju- og gasídnaðinum. Samband - Christian V. Dalsgaard, Microsoft SharePoint Specialist, MCTS, MCP TLF - 599 123, email - christian@dalsgaard.info